Jákup bjargaði Herfølge

Superligan: FCK vann fyri aðru ferð á rað, men upp í gleðini yvir sigurin á grannunum úr AB varð mikukvøldið blandaður harmur um, at næstan allir verjuspælararnir eru skaddir

Jákup Mikkelsen var ein hin størsta orsøkin til, at Herfølge fekk stig burtur úr dystinum móti Silkeborg

Føroyska luttøkan í superliguni mikukvøldið var ikki so stór, sum hon va rnæstsíðst. Í FCK gjørdu teir undan nýklassikaranum ímóti Brøndby av, at Todi Jónsson skuldi ikki spæla. Lærskaðin, sum Todi fekk undir skotvenjing á Svangaskarði fríggjakvøldið, versnaði so mikið tíðliga í 2. hálvleiki ímóti Slovenia, at Todi fyrrapartin av hesi vikuni ikki fekk vant saman við liðfeløgunum í FCK, og tískil fekk hann heldur ikki spælt mikukvøldið.

At Óli Johannesen í vikuskiftinum var heima í Føroyum og hjálpti til so at siga at seta Slovenia upp á pláss á Svangaskarði tóktist mikukvøldið ikki hava styrkt um støðu hansara í AGF hópinum. Spurningurin er so, hvussu tað hevði verið vorðið, um Óli hevði havt verið heima í Århus og vant. Tann spurningurin er – so segði maðurin – hypotetiskur, og tískil verður hann ikki svaraður.

Óli Johannesen var í AGF hópinum. Næstsíðst spældi hann allan 2. hálvleik. Hesa ferð var hann bara við teir síðstu fimm minuttirnar á heimavøllinum í Århus, tá oddaliðið úr Lyngby vitjaði og fór við øllum stigunum. Óli kom í 85. minutti á vøllin fyri Michael Nonbo. Tá hevði Óli sitið leingi á beinkinum. Tíðliga í 2. hálvleiki sveik ein partur av ljósinum í Århus. Tað gingu fleiri enn tjúgu minuttir, áðrenn brekið varð rættað og dysturin bríkslast í gongd aftur.

AGF tapti 4–1 ímóti sera sannførandi Lyngby, sum við sigrinum styrkti um oddasessin. Tá 40 minuttir vóru farnir, hevði Lyngby lagt seg á odda 3–0. Lyngby, sum bara hevði ein mann heilt á toppinum, var framúr vandamiklið í kontraspælinum.

Tað kann væl hugsast, at møguleikin hjá Óla Johannesen ikki versnaði mikukvøldið. Verjan var ikki serliga sannførandi, og eitt korter undan leikloki sá verjuspælarin Dennis Siim reytt fyri neyðbremsu. Tað vil siga, at hann verður ikki tøkur næstu ferð.

Næsta royndin hjá AGF – og vónandi Óla Johannesen – verður á útivølli ímóti grannunum í Silkeborg.

Jákup stórspældi

Herfølge hevði vitjan av Silkeborg. Sum alla aðra staðni í Danmark, har tað mikukvøldið varð spælt í superliguni, oysregnaði í Herfølge. Hetta gjørdi ikki arbeiðsumstøðurnar hjá málverjunum betur. Men tað eydnaðist Jákupi Mikkelsen at halda tætt.

Tað vóru ikki nógvir upplagdir málmøguleikar. Silkeborg hevði onkrar síðsta korterið av 1. hálvleiki og aftur í síðsta korterinum av 2. hálvleiki. Landsliðsmaðurin Henrik Tømrer Petersen hevði onkran sera vandamiklan stútara fram ímóti dystarenda, men Jákup Mikkelsen bjargaði frágera væl út til horna. Harvið fekk Herfølge eitt stig, og nú eru teir so smátt við at lyfta seg fram ímóti niðurflytingarstrikuni.

Sunnudagin skal Herfølge til Gladsaxe at spæla ímóti AB.

Zuma skoraði

Todi Jónsson sat saman við 13.952 áskoðarum og hugdi at, tá AB var í Parkini. Talan var um nógv hægsta áskoðaratalið mikukvøldið. Í Herfølge vóru 1.428 áskoðarar, og í Århus vóru teir 3.807. Áskoðaratalið var væl hægri enn alla aðra staðni mikukvøldið. Tað var ikki so høgt, sum tað plagar at vera, tá Brøndby er í Parkini, men høga áskoðaratalliðá boðar frá, at nú verður av álvara roknað við AB sum eitt av stóru liðunum í Danmark.

FCK vann 1–0. Málið fingu teir tíggju minuttir undan leikloki. Suðurafrikanarin, Sibusiso Zuma, skoraði málið, eftir at norðmaðurin Harald Brattbakk hevði spælt hann út frá baklinjuni í høgru.

Nú hevur FCK vunnið tvær ferðir upp í slag. Roy Hodgson var sjalvsagt fegin um stigini, men hann segði seg stúra eitt sindur fyri komandi dystum. Orsøkin er tann, at so nógvir verjuspælarar hjá FCK eru skaddir. Mikukvøldið noyddist Bo Svensson at taka seg av vøllinum. Sambært Roy Hodgson eru bara tríggir rættuligir verjuspælarar, sum ikki eru skaddir, eftir í hópinum. FCK venjarin helt fyri mikukvøldið, at um ein verjuspælari verður skaddur afturat, so verður neyðugt at seta ein av framrættaðu monnunum í verjuna.

FCK skal í næsta umfarinum spæla í Aalborg.

Hini úrslitini

Viborg, sum kritsi himmalferðardag vann steypafinaluna, hevur verið væl við higartil í ár. Men teir fingu rættuliga oyruni í Brøndby maskinuna mikukvøldið. Tað var skjótt, at heimaliðið hevði skorað tvey mál, og so var alt avgjørt.

Botnliðið úr Haderslev fór aftur úr Ikast við einum orduligum lúsingi. Samansetta liðið á Miðjyllandi, FCM, vann 5–1, og nú eru teir á triðja plássi. Hópin myrkari sær tað út hjá Haderslev, sum er einsamalt í botninum.

Fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson, Carsten Hemmingsen, var fyri fyrstu ferð síðani 1996 á miðvøllinum hjá OB, sum í Odense hevði vitjan av AaB. OB skoraði tvær ferðir undan steðginum, og so var greitt, at øll trý stigini fóru at verða í Odense.

JH

Danska superligan, úrslit

06.09.00	AGF-Lyngby	1-4
06.09.00	Brøndby-Viborg	2-0
06.09.00	OB-AaB	2-0
06.09.00	FCK-AB	1-0
06.09.00	FC Midtjylland-Haderslev	5-1
06.09.00	Herfølge-Silkeborg	0-0

Komandi dystir

09.09.00	Viborg-FC Midtjylland
10.09.00	AB-Herfølge
10.09.00	Haderslev-OB
10.09.00	Lyngby-Brøndby
10.09.00	Silkeborg-AGF
11.09.00	AaB-FCK

Lagið á leyvuni, Leo, er vorðið betri seinastu tíðina, nú FCK aftur er farið at vinna

Støðan, danska superligan

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Lyngby	7	5	0	2	12	10	2	15
2	FC Midtjylland	7	4	1	2	15	9	6	13
3	Silkeborg	7	3	3	1	9	12	-3	12
4	Brøndby	7	3	2	2	18	7	11	11
5	Viborg	7	3	2	2	9	6	3	11
6	OB	7	3	1	3	10	5	5	10
7	FCK	7	3	1	3	9	6	3	10
8	AaB	7	3	1	3	10	11	-1	10
9	AB	7	2	3	2	11	7	4	9
10	AGF	7	3	0	4	9	15	-6	9
11	Herfølge	7	2	1	4	9	18	-9	7
12	Haderslev	7	0	1	6	6	21	-15	1

B36 situr við lyklinum til uppflytingina

3. deild: Um tað verður Skáli ella AB, sum endar á beinleiðis uppflytingarplássinum veldst ikki minst um, hvussu liðini fara at standa seg ímóti B36

Støðan, 3. deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Skála	15	10	1	4	59	32	26	31
2	AB	15	10	0	5	70	35	35	30
3	B36	15	9	1	5	43	21	22	28
4	VB	15	8	1	6	43	42	1	25
5	B71	15	8	0	7	51	44	8	24
6	TB	15	6	2	7	44	44	0	20
7	B68	15	4	5	6	37	37	0	17
8	FS Vágar	15	5	2	8	45	54	-9	17
9	ÍF	15	4	1	-10	36	51	-15	13
10	KÍ	15	4	1	-10	36	104	-68	13

Fótbóltsarið er av álvara farið at halla. Í yngru og lægru deildunum verður spælt um FM heitið, og í 3. deild er tað komið so mikið langt, at nú ger strikan seg galdandi. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað eru trý umfør eftir, og at nú ber ikki til longur at flyta niður í lægri deild.

Síðsta vikuskifti varð ikki spælt í 1. deild. Tað hevði við sær, at teir, sum vikuskiftið frammanundan høvdu sitið á beinkinum í 1. deild, høvdu møguleika at spæla í 2. deild og í 3. deild, har næstbesta liðið er í tí deildini. Onkur feløg brúktu henda møguleikan. Men ikki øll gjørdu soleiðis, og tað skarst ikki so væl hjá øllum teimum, sum brúktu møguleikan.

Úrslitini hesa ferð – allir dystirnir vóru leygardagin – høvdu við sær, at heilt nógv bendir á, at tað verður Skáli ella AB, sum fer at vinna beinleiðis uppflytingarplássið, meðan hitt liðið fer at spæla í endaumfari ímóti tí næstaftasta í 2. deild.

Um tað verður AB ella Skáli, sum vinnur rættin til beinleiðis uppflyting, veldst um úrslitini tríggjar tær seinastu ferðirnar. Skáli skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti B68, so skulu teir í Gundadal ímóti B36, og í síðsta umfarinum fáa teir vitjan av TB. AB fær sunnudagin vitjan av ÍF, so skulu teir á Svangaskarð, og í síðsta umfarinum fáa teir vitjan av B36.

Tað vil við øðrum orðum siga, at bæði oddaliðini skulu spæla ímóti B36. Havnarmenninir eru á triðja plássi. Teir hava framvegis møguleika at gera av sjálvir, um teir skulu enda ovast og harvið vinna gull krónurnar, og tað vil aftur siga, at teirra leiklutir er stórur í, hvør skal flyta beinleiðis upp.

FS Vágar–KÍ

Klakksvíkingar kundu rættuliga havt lyft sær úr botninum, um teir vunnu. Men teir møttu við ikki serliga sannførandi liði. FS Vágar var nógv betur, teir vunnu stórt, og harvið er næstan greitt, at teir eisini komandi ár fara at eiga pláss í 3. deild.

Stuttligt er tað at staðfesta, at millum málskjúttarnar var Torkil Nielsen. Í komandi viku verður tíggju ára dagurin fyri minniliga sigrinum á Eysturríki í Landskrona og fyri málinum, sum Torkil Nielsen skoraði og sum fór um allan heimin. Kenslan at skora ímóti 3. deild hjá KÍ og Andreasi Johannesen í KÍ málinum hevur neyvan verið tann sama hjá Torkili, sum hon var fyri tíggju árum síðani, og rómurin kring vøllin var leygardagin heldur ikki tann sami, men málið var týdningarmikið fyri eykaliðið hjá FSV.

4. deildarliðið hjá KÍ er komið í endaspælið. Um tað skuldi komið soleiðis fyri, at 3. deildarliðið flytir niður, so hava teir møguleika at spæla 4. deildarliðið upp – um tað er nakað gott hugskot.

KÍ hevur undanfarnu árini megnað at hildið málskjóttingina hjá mótstøðumonnunum niðanfyri eitt hundrað í teimum átjan dystunum. Hesa ferð eydnaðist tað ikki. Nú eru 104 mál farin ígjøgnum.

B68–ÍF

Felags fyri bæði liðini er, at tey plaga at vera í ovara enda, og at tey í ár bara hava verið ein skuggi av tí, sum tey ofta hava verið undanfarin ár.

Fótbóltsupplivilsið á Svangaskarði var so sum so. Tað var lítil munur á liðunum, sjálvt um Jan Petersen, sum var leikbannaður, tá besta liðið hjá B68 næstseinasta vikuskifti smurdi KÍ av, var á miðvøllinum . Fuglfirðingar tykjast hava fingið betri tak á tí, nú fleiri veteranar eru aftur á liðnum.

Aksel Højgaard legði heimaliðið framum, tá eitt korter var farið. Eftir skjótt álop stútaði hann innlegg úr høgru í kassan. Eitt lítið korter var farið av 2. hálvleiki, tá Árni Petersen javnaði fyri ÍF. Við handara stólpan stútaði hann frísparksinnlegg úr vinstru frá Ken Bærendsen í kassan aftanfyri Kjartan Nesá.

Allan Joensen, sum í fjør var málverji hjá B68 – viðhvørt í 1. og viðhvørt í 3. deild – vardi málið hjá ÍF á Svangaskarði.

Hjá B68 var tað merkisvert, at faðir og sonur vóru á sama liði. Aksel Højgaard, málskjúttin hjá B68, var inni alla tíðina, og sonur hansara, Jóhan Dávur Højgaard, spældi teir síðstu átjan minuttirnar.

Bæði hjá B68 og ÍF var talan um fyrsta javnleikin í ár.

B36–VB

Sambært skipanini átti dysturin at verið spældur í Gundadali. Men B36 var í Vági eftir tí eina stiginum. Tað komst av, at B36 ikki megnaði at manna lið, tá teir í 9. umfarinum skuldu havt verið í Vági. Reglarnir siga, at um eitt lið ikki møtir á heimavølli, so missir felagið heimavøllin.

Hjá VB vóru Eyðun Kjærbo, Kári í Lágabø og Petur Óli Samuelsen, sum allir høvdu sitið á beinkinum allar 90 minuttirnar í toppdystinum í 1. deild ímóti HB, á liðnum.

Kortini var tað B36, sum kom á odda, tá Vinjard Guttesen fekk bóltin í málið. Petur Olaf í Lágabø (við brotssparki) og Hans Jákup Hjelm fingu tó lagt heimaliðið fram um aftur, áðrenn farið varð til hálvleiks.

Í seinna hálvleiki leikaði leingi javnt á, og kanska hevði B36 yvirvág í spæli. Tað eydnaðist teimum eisini at koma upp á javnt, við einum máli, sum Tummas Eli Hansen skeyt. Móti dystarenda hevði Tummas Eli ein risa møguleika at avgera dystin, men javnleikur gjørdist so endaliga støðan.

Bæði hjá B36 og VB var talan um fyrsta javnleikin á árinum.

TB–AB

Eingin ivi var um, at heimaliðið ikki ætlar sær nakran veg, meðan gestirnir hava uppflyting til 2. deild sum ikki veruleikafjart mál. AB var nógv betri fyri, teir vóru skjótari, teir vóru kropssterkari, og teir orkaðu væl betur.

Í eini handavend, tá eitt lítið korter var farið, kom AB framum við tveimum málum. Svend Poulsen staðfesti fyrst sína støðu sum toppskjútti, og so stútaði Benny Poulsen í málið.

TB hevði so at siga ongar atsóknir. Stutt undan steðginum varð ein langur bóltur skotin fram. Gunnleifur Rasmussen í AB málinum hálvbjargaði í fyrstu atløgu, men Jóhannes Johannesen var fyrstur á returinum. Eftir eitt korter av 2. hálvleiki endaði AB uppspæl í høgru við innleggi til handara stólpan. Har smekkaði vongverjin í vinstru, Sigurð Justinussen, til, og bólturin small í nærra stólpan, áðrenn hann fór í málið.

Eyðun Dalsgarð, sum var komin á vøllin, tá eitt korter var farið av seinna umfarinum, staðfesti argjasigurin. TB misti í uppspælinum, rangstøðufellan miseydnaðist, og so var mál.

B71–Skáli 3–5

Tað gekk leingi javnt á, men tá gestirnir í 2. hálvleiki komu framum 3–2, skrædnaði hjá sandoyingum, sum ikki megnaðu at svara aftur fyrrenn fram ímóti dystarenda, tá Alex Nielsen, sum ikki spældi við, tá besta B71 liðið stóð seg so væl í Gundadali, pyntaði um.

Spælandi venjarin hjá skálamonnum, Kaysten Rasmussen, var eyðsýndur. Fyrst gjørdi hann nýtslu av brotssparkið, sum var dømt fyri hands, og so sneiddi hann fleiri av og skoraði hjá Henriki Juul úr meiri enn 20 metrum. Ib Morh Olsen hevði frammanundan seinna málinum javnað til 1–1, tá hann eftir hornasparksinnlegg frá Torbirni Jensen fekk síðsta fótin á. Ein annar B71 veteranur, Páll á Reynatúgvu, javnaði til 2–2 upp á brotsspark, sum varð dømt fyri harðligt spæl.

Í 2. hálvleiki komu trý mál, og var tað Skáli, sum fekk hesi tilskrivað. Okkum hevur tíverri ikki eydnast at fingið uppspurt, hvør skeyt tey trý seinastu málini hjá Skála.

Máltindurin á hesum síðum eigur tí at verða tikin við fyrivarni hesu ferð.

Úrslit

FS Vágar–KÍ 8–0 (4–0)
1-0: Petur Niclassen 21.
2–0: Magnus Simonsen 27.
3–0: Torkil Nielsen 42.
4–0: Magnus Simonsen 44.
5–0: Petur Niclasen 49.
6–0: Magnus Simonsen 69.
7–0: Magnus Simonsen 72.
8–0: Petur Niclasen 76.

B68–ÍF 1–1 (1–0)
1–0: Aksel Højgaard 16.
1–1: Árni Petersen 57.

B36–VB 2–2 (2–1)
spældur í Vági
0–1: Vinjard Guttesen
1–1: Petur Olaf í Lágabø br
2–1: Hans Jákup Hjelm
2–2: Tummas Eli Hansen

TB–AB 1–4 (1–2)
0–1: Svend Poulsen 11.
0–2: Benny Poulsen 12.
1–2: Jóhannes Johannesen 42.
1–3: Sigurð Justinussen 59.
1–4: Eyðun Dalsgarð 89.

B71–Skáli 3–5 (1–2)
0–1: Kaysten Rasmussen br
1–1: Ib Mohr Olsen
1–2: Kaysten Rasmussen
2–2: Páll á Reynatúgvu br
2–3: Ikki upplýst
2–4: Ikki upplýst
2–5: Ikki upplýst

16, umfar
verður 10. september
VB–FS Vágar
Skáli–B68
KÍ–B36
B71–TB
AB–ÍF

Máltindurin

Svend Poulsen	AB	19
Kristoffur Vidtfeldt	B71	15
Petur Niclasen	FS Vágar	14
Aksel Højgaard	B68	13
Pauli Hansen	Skála	12
Signar Johannesen	AB	11
Magnus Simonsen	FS Vágar	11
Egill Steintórsson	VB	10
Oddbjørn Joensen	AB	9
Per Joensen	VB	9
Regin Arge	B36	8
Kaysten Rasmussen	Skála	8
Kaj Roest	TB	8
Hans Christian Djurhuus	Skála	7
Hallur Christiansen	TB	7
Jákup Olsen	B68	6
Páll á Reynatúgvu	B71	6
Jákup Baldvinsson	ÍF	6
Marius Joensen	Skála	6
Kári í Lágabø	VB	6
Tumas Eli Hansen	B36	5
Jógvan Arnfinn Jacobsen	ÍF	5
Aksel Johannesen	KÍ	5
Eyðun Svalbard	TB	5
Jóhannes Johannesen	TB	5
Fróði Stenberg	AB	4
Dánial Petur Johansen	B36	4
Vinjard Guttesen	B36	4
Eirikur Poulsen	B71	4
Jónsvein Thomsen	B71	4
Sjálvmál	B71	4
Ken Bærendsen	ÍF	4
Bárður Andreasen	KÍ	4
Leon Bjartalíð	KÍ	4
Jón Rasmussen	Skála	4